
Thor Magni á Besiktas skipasmiðjuni uttan fyri Istanbul

# Thor Magni: Nýggj byrjan hjá Thor á heimshøvunum

Deil:



**Jan Müller**

21.02.2015 - 17:18

Oljan.fo

Jan Müller, Besiktas skipasmiðjan í Turkalandi.

Í skínandi sólskini eftir kava og regn í fleiri dagar varð fyrrapartin blást í hornið hjá Thor gudinum á turkisku skipasmiðjuni Besiktas. Tá varð fyrsta av tilsamans fýra frálandsskipum til reiðaríið Thor í Hósvík navngivið, og harvið varð hol sett á byrjanina til eitt spildurnýtt kapittul í áhugaverdu og spennandi frálandssøguni hjá føroyska reiðaríinum. Til steðar til hátíðarhaldið vóru umboð fyri skipasmiðjuna, reiðararíið,

fíggingar- og tøkniligar stovnar og eisini seismikkfelagið PGS, sum hevur gjørt tað møguligt hjá Thor at fara undir hesa stóru verktætlan, sum fer at kosta tilsamans 600 mill. kr., tá øll skipini er liðug. Thor hevur nevniliga langtíðarleigað tey fýra skipini, sum øll fara í drift í hesum árinum, til norska seismikkfelagið PGS. Haraftrat hevur felagið optiónir uppá leigu tvær ferðir fimm ár aftrat.

Thor Magni, sum fekk navn í morgun, er klárur at fara til arbeiðis og gongur leiðin nú til Bergen, haðani skipið fer undir sína fyrstu uppgávu í Norðsjónum. Við skipinum eru 9 mans, harav fimm føroyingar, tveir filipinar og ein bulgari.

Lesið meira um stóru verkætlanina hjá Thor í komandi greinum á oljan.fo, sum varð við til hátíðarhaldið í Turkalandi.





